


STUDIO PEGASUS

tlf 456500

TRYGD • TÆNASTA • TRIVNAÐUR
- størri TRYGGLEIKA í ferðsluni

# SKRIVSTOVUFÓLK

**Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akstovuna til at byrja skjótast tilber. Talan er um parttíðarstarv.**

UPPGÁVAN
Uppgávan fevnir m.a. um:
- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Sýnsumsiting

FØRLEIKAKRØV
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á at ein hevur góð samstarvsevni og at viðkomandi er fyrikomandi og tænastuhugaður. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

SETANARTREYTIR
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umfram Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jákup Jacobsen, stjóra, á telefon 350400.
Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða okkum í hendi í **seinasta lagi 20. august 2007.**

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjald og vegskatt. Umfram høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir kring alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

AKSTOVAN
Hoyvíksvegur 57 • Postsmoga 3206 • FO-110 Tórshavn
Tel. 35 04 00 • Fax 35 04 01 • www.akstovan.fo • akstovan@akstovan.fo

# Sølufólk/kundaráðgevi til Telebúðina í Miðvági

"Tá ið nýggj tøkni kemur rullandi, eru vit annaðhvørt partur av trumluni ella partur av vegnum"
- Steward Brand -



Søkt verður eftir starvsfólki til Telebúðina í Miðvági at byrja skjótast gjørligt.

Telebúðin í Miðvági er ein av seks Telebúðum kring landið. Telebúðirnar hevur ment seg nógv og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar.

Til rætta fólkið er talan er um eitt avbjóðandi starv. Arbeitt verður í einum krevjandi og mennandi umhvørvi, har stórur dentur verður lagdur á góðan handilsskap og eini tráan eftir at veita eina skjóta og munagóða tænastu.

**Vit vænta at tú:**
- Dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt og taka ábyrgd
- Er fyrikomandi, ágrýtin og dugir væl at tosa við kundar
- Hevur dirvi og áræði at taka tøk og røkka ásettum málum
- Hava evni at samstarva við ymiskar starvsbólkar
- Hevur førleika at seta teg inn í nýggja tøkin

Starvið er normera til uml 3⁄4 tíð. Lønin er sambært sáttmála Føroya arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið

Gjøllari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Høgna Vilhelmsen á 243331 ella hvi@ft.fo.

Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi áðrenn mánadagin 6.august 2007 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
Fo-110 Tórshavn

**FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll støðarútgerð fyri fastettelefoni og breiðband. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT-Samskifti verða markanaðarførdar undir navninum Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*